

## Nephew í MTV-awards

Kendi danski bólkurin Nephew, sum tvær ferðir hevur prógvað sína dygd á Gøtusandi og vunnið hjørtuni á føroyingum, eru nú innstillaðir til MTV awards fyri besta danska bólk. MTV hevur á hvørjum ári eina storfingna heiðurslønahandan. Nógvar heiðurslønir verða latnar, m.a. besti nýggi kvinnuligi- og mannligi sangari, besti bólkur, besta fløga o.s.fr. Hetta er eitt stórt show, og bert at vera innstillaður er ein stórur heiður. Síðani MTV eisini fekk støðir í Norðurlondum, hava heiðurslønir eisini verið lætnar fyri besta danska, norska og svenska bólk. Og í ár hava Nephew so heiðurin av at vera millum tríggjar teir bestu donsku bólkarnar. Hinir donsku bólkarnir eru Dune og Volbeat. Nephew hevur fingið nógv rós fyri seinastu fløguna "Intercom kom ind", sum eisini var ein av best seldu fløgunum í Danmark. Endurinnspælingin av "The Way I Are" hjá Timbaland, sum eisini hittaði her heima í Føroyum alt summar, hevur veruliga givið bólkinum vind í seglini. Nú er so størsti heiðurin, nevniliga ein heiðursløn frá MTV, í skotmála. Akvøtt verður á netinum, og um tú hevur hug at gera tína atkvøðu galdandi, kanst tú fara inn á http://ema.mtv.dk/voteNow - /bedste-danske-kunstner/ og atkvøða. Tú kanst greiða atkvøðu heilar 10 ferðir um tíman, so tað er bert at seta urið.

# Rætturin inn í vatnkríggj

**Landsverk vil ikki betala fyri vatn, tí tað ger heldur ongin annar á Tvøroyri. Og Strandferðslan vil ikki betala fyri eina tænastu, sum hon ikki fær. Men Strandferðslan heldur kortini dyrnar á gloppi**

ÓSEMJA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Smyril hevur verið miðdepilin í mongum ósemjum ímillum Tvøroyrar kommunu og almennu myndugleikarnar, men Tvøroyrar Býráð er til reiðar at fara so langt, sum krevst, fyri at fáa eina endaliga avgerð*

-Vit vilja hava sama rætt í Tvøroyrar kommunu, sum øll onnur fáa.

Tað er orsøkin til, at Landsverk ikki vil betala fyri at Smyril skal sleppa at bunkra vatn á samferðsluhavnini í Trongisvági.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sigur, at varð skrúvað fyri vatninum, høvdu bæði farstøðin og farmahøllin mist vatnið og so høvdu tey verið noydd at stongt. Harafturat hevði Smyril mist vatnið.

- Stóri spurningurin er, um samferðsluhavnir hava rætt til somu ókeypis tænastur í eini kommunu sum aðrir almennir stovnar, virkir og borgarar hava, sum hava fingið íbindingarloyvi frá kommununi, sigur stjórin í Landsverki.

- Ella skal tað bera til at gera undantøk, so at kommunan í hesum føri kann krevja vatngjald frá samferðsluhavnini í kommununi?

Oyvindur Brimnes vísir á, at tað er landið, sum eigur og rekur samferðsluhavnina á Krambatanga, men at Landsverk hevur fingið loyvi til at binda í kommunalu vatnveitingina, akkurát, sum øll onnur í kommununi, bæði almennir stovnar, virki og borgarar.

Tí eigur samferðsluhavnin eisini at fáa vatn og aðrar vanligar ókeypis tænastur frá kommununi á jøvnum føti við øll onnur í somu kommunu.

Stjórin á Landsverk sigur, at naggatódn er komin í málið og partarnir eru samdir um, at ber ikki til at finna semju og tí er neyðugt at royna málið í rættinum.

- Vit bóðu Tvøroyar kommunu royna málið í rættinum, so at ein loysn varð funnin uttan at nerva farstøðina, farmahøllina ella tey ferðandi við Smyrli.

- Hetta setti Tvøroyar kommuna seg ímóti, og helt fast við at skrúva fyri vatninum.

- Tí vendu vit okkum til fútarættin fyri at fáa sett fútaforboð ímóti, at kommunan skrúvaði fyri vatninum og fyri at fáa málið í rættin fyri at fáa eina endaliga avgerð.

Oyvindur Brimnes sigur, at fútaforboðið er sett í verk og nú kemur málið so fyri í Føroya Rætti.

Vilja ikki betala fyri onki

Strandferðslan er næstan líka óviljað at betala rokingarnar frá Tvøroyrar Kommunu, sum Landsverk er.

- Vit vilja ikki betala Tvøroyrar Kommunu fyri eina tænastu, sum vit ikki fáa, sigur Regin Vágadal, stjóri í Landsverki.

Tað er orsøkin til, at Strandferðslan ikki vil betala Tvøroyrar Kommunu havnagjald fyri Smyril, tá ið hann liggur við Krambatanga í Trongisvágsfirði.

Tað er landið, sum hevur bygt og goldið havnina og Smyril kemur ikki í samband við nakað hjá Tvøroyrar Býráð.

- Tí er útgangsstøðið, at tað er burturvið, at landið skal betala fyri at brúka havnina.

Vanliga verður bara betalt fyri eina ávísa tænastu og vit koma ikki nær nøkrum hjá Tvøroyrar kommunu.

- Vit hava heldur ikki brúk fyri loðsi, ella hjálp ella vegleiðing og tí er ongin tænasta at betala fyri.

Men kortini letur Regin Vágadal hurðina standa á gloppi.

Tvøroyrar kommuna hevur eina havnaskrivstovu og tað kann vera, at vit onkuntíð hava brúk fyri at koma í samband við havnaskrivstovuna at spyrja um veður, ella til okkurt annað.

Og tað er ein spurningur, um vit ikki høvdu verið sinnað at funnið onkra semju við Tvøroyrar Kommunu um at betalt eina lítla upphædd fyri at hava tað tænastuna til taks.

Men stjórin á Strandferðsluni leggur dent á, at tað verður ikki ein upphædd, sum er nær í námind av tí, sum Tvøroyrar Kommuna krevur.

*Sí eisini grein á síðu 9.*

# Marjus og tey fáa eina viku afturat

**Løgtingsformaðurin hevur givið rættarnevndini eina viku afturat at gera seg lidnan við uppskotið um at gera Føroyar til eitt valdømi**

POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sum væntað lukkaðist rættarnevndin hjá løgtinginum ikki at avgreiða málið um at gera Føroyar til eitt valdømi til tíðina.

Eftir tingskipanin hevur ein tingnevnd ein mánað at viðgera eitt uppskot í og sostatt skuldi rættarnevndin leggja álit fyri løgtingið í gjár, 4. oktobur.

Men Marjus Dam formaður í nevndini, segði beint eftir at málið varð beint í rættarnevndina 4. september, at talan var um so umfatandi mál, at tað fór neyvan at eydnast at halda tíðarfreistina.

Og so var tí mikudagin mátti rættarnevndin søkja løgtingsformannin um at leingja freistina.

Rættarnevndin sigur í umsóknini til løgtingsformannin, at ætlanin er at viðgera uppskotið aftur mánadagin og tá er ætlanin at skriva eitt fyribils álit og tí verður biðið um at fáa freistina longda til næsta fríggjadag, sum er 12. oktobur.

Hesum hevur løgtingsformaðurin játtað.

Rættarnevndin sigur, at hon hevur havt tríggjar fundir um málið og á hesum fundum hevur nevndin innkallað eina røð av fólki.

Millum tey, sum hava verið í nevndini og sagt sína hugsan, eru Petur Zachariassen, støddfrøðingur, Halgir Winther Poulsen, sakførari, Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, Sjúrður Skaale, samfelagsfrøðingur, Ingibjørg Berg, Cand. Mag í statsvísindi, Jóanes N. Dalsgaard, stjórnmálafrøðingur, og Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

Harumframt hava eisini umboð fyri Javnstøðunevndina og Demokratia verið á fundi við rættarnevndina um málið og harafturat hevur nevndin fingið skriv frá Michael Feldballe, sum eisini hevur havt eitt uppskot um eina valskipan.